# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ella Arge 90 ár



Tórsdagin 11. august verður Ella Arge, Tórshavn, 90 ár. Hon varð født í Vági - foreldur hennara vóru Elisabeth, ættað Þorkeri, og Símun Vilhelm - Símun á Tjørn – ið var úr Vági. Elisabeth og Símun áttu trý børn, Thom, Johanna og Ella, harav bert Ella er eftir á lívi.

Ella vaks upp í Vági, og flutti seinni til Havnar, har hom møtti Oscar Arge, ið hon giftist við. Tey fingu sonin Símun. Ella og Oscar vóru fryntlig fólk, vóru altíð fyrikomandi og hjartalig, og mangur man gjøgnum árini hava notið gott av ovurstóra blíðskapi teirra. Tey vóru kend víða um í Føroyum, og teirra lætta lyndi smittaði av, har tey vóru. Ella bleiv einkja fyri umleið tríati árum síðan.

Síðan møtti hon Vagn, ið hon hevur livað eitt ríkt lív saman við, og hava tey tikið lut í mongum felagslívi. Teirra hurð er altíð opin, og blíðskapurin er sum hann altíð hevur verið. Nú heilsan hjá er er farin at bila, er hann ein stór hjálp hjá tær, og tað vil eg takka honum fyri.

Ella hevur altíð havt stóran tokka til børn, tað hava vit notið gott av, og hava nógv at takka mostur fyri. Og minnast vit systrar aftur á allar tær frálíku summarferiurnar, ið vit vóru hjá henni. Vit komu næstan hálvdeyðar av sjóverki norður við gamla Smyrli, tá tók tað ikki bert tveir tímar sum nú, men ein heilan dag.

Ella eigur tvey ommubørn, og tvey langommubørn, ið eru henni til stóra gleði.

Mostir góða, við míni hjartans tøkk fyri alt, ið tú hevur verið fyri meg og míni, ynski eg tær hjartaliga tillukku við 90 ára degnum. Má Harrin signa teg framyvir, og geva tær eitt friðsælt lívskvøld, nú sólin lækkar, og bert vesturskinið er eftir á longu lívsleiðini.

Bestu heilsanir

**Marlena við familju**

## Andlát og jarðarferðir

Jákup Thomsen á Kósini í Klaksvík, ættaður úr Nólsoy, andaðist leygardagin 6. august, 80 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi mánadagin klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni týsdagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Lítli Elias, sonur Charlotte og Anker Henriksen í Vági, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 7. august.

*Kelda: Útvarpið*

### Dagurin

**9. august. Romanus**, deyður umleið 250. Halgisøgurnar eru ikki á einum máli, um hann var ein umvendur rómverskur hermaður ella ein kristin prestur. Hálshøgdur varð hann í hvussu so er fyri trúar sakir.

### Rætting

til Nøvn í vikuni leygardagin 6. august, síða 13.

Í eini føðingardagsheilsan til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, ið fylti 55 ár, stóð, at hon og maðurin, Jóannes Símunarson Hansen, eiga tveir synir, Símun og Ólavur. Hetta er ikki rætt, tey eiga eisini dóttrina Elin Mariu Hansen.

Fyri 25 árum síðan:

## Lærarar í 1980



Í 1980 fingu 25 nýggir lærarar prógv á Føroya Læraraskúla.
Aftara rað f.v.: Jónsvein Poulsen, Jens Christian Skaalum, Ólavur Winther, Pauli í Sandagerði, Árni Dahl, lærari, Marner Tausen, Bynne Lamhauge, Palle Joensen og Høgni Lützen.
Næst aftasta rað f.v.: Jógvan Martin Mørk, Hallur Ellingsgaard, Selmar Jacobsen, Andreas Højgaard, rektari, Gunder Nybo og Niels Jákup Thomsen.
Næst fremsta rað f.v.: Maud Benjardøgg, Jacoba Funding, Lena Jacobsen, Ruth Joensen, Valborg Rasmussen, Jens A. Johannesen og Símun Ejler Berg.
Fremsta rað f.v.: Eyðbjørg Dalsgard, Jenny Lydersen, Judith Schrøter og Astrid Madsen.
Kristian Poulsen vantar á myndini

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1980*

Skúlin á Trøðni:

## Jan Christiansen nýggjur skúlastjóri

TÍÐINDASKRIV



Landsstýrismaðurin hevur sett Jan Christiansen sum skúlastjóra í Skúlanum á Trøðni frá 1. august 2005.

Jan er 47 ára gamal, tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla 1982 og hevur síðan tá arbeitt sum lærari í Sernámsdeplinum. Í 1986 tók hann serlæraraútbúgving og í 1987 útbúgving sum tali- og hoyrilærari.

Lógin um nýggjan serskúla (skúlin á Trøðni) kemur í gildi 1. januar 2006.

Frá 1. august 2005 skal nýggi stjórin saman við leiðaranum í Sernámsdeplinum og Mentamálaráðnum fyrireika skipanina av Skúlanum á Trøðni.

## Tøkk

Øllum tykkum sum á ymsan hátt gleddu meg á 85 ára føðingardegnum 16. juli, takki eg hjartaliga.

*Heilsan*

**Lydia Hansen, Norðragøta**